# arnar

fara at taka ímóti. Hann heldur, at støðan á føroyska markaðinum er rættiliga sermerkt.

- Àðrenn deildu Atlantic og Maersk marknaðin, men nú hevur Atlantic voksið um útboðið, og nú koma vit á marknaðinum. Tískil verður tað brádliga kapasitetur fyri trý feløg. Tað sigur seg sjálvt, at skal tað bera til, so skulu fleiri ferðafólk til. Og tað vilja tað eisini koma. Marknaðurin er langt frá mettaður. Vit hava sæð tað aðrastaðni, at við at gera tað bíligari - í øllum førum tann eina vegin - fáa vit fólk í flogførini, sum annars ikki vildu verið farin avstað, sigur Jesper Rungholm.

- Við teirri røttu marknaðarføringini við fríari prísáseting er møguligt at fáa 200.000 ferðafólk at ferðast millum Føroyar og Danmark. Tað er tískil ríkiligt av plássi til okkum - og til Atlantic Airways.

Jesper Rungholm heldur ikki, at tað er so keðiligt við landsstýrinum sum eigara og myndugleika. Jesper Rungholm sigur seg, at hann metir landsstýrið hevur ein sunnan hugburð.

Men hvat hendir, um flogferðslumarknaðurin verður latin púra upp í Føroyum?

- Tað vildi verið gott fyri Føroyar, men eg veit ikki, hvussu tað hevði gingið hjá Atlantic. Haldi kortini Atlantic vildi fingið nógv burturúr, tí hvør hevur áhuga fyri at flúgva til Føroya - ikki serliga nógv, spyr og svarar Jesper Rungholm.



*Nakað fyri seg. Frá einum flogfari og skrivstovu í stovuni til 140 starvsfólk upp á fimtan ár. Jesper Rungholm hevur satsað 500.000 kr. upp á Føroya rutuna , men hann hevur ongan trupulleika at gevast, um ferðafólkini ikki orka propellirnar*

## Ongantíð BA

Framtíðarlagnan hjá DAT er ikki bundin av, hvussu úrtøkan við Føroya flúgvingini verður. Jesper Rungholm sigur, at DAT hevur kastað 500.000 krónur

- Vit eru sannførdir um, at vit kunnu standa okkum væl í Føroyum. Vit eru fleksiblir og hava eina góða góðsku á okkara vøru. Føroyar eru ein lættur marknaður at hava við at gera. Tað er rættiliga lætt at koma fram í miðlinum. Eg var í Føroyum í tveir dagar, og tað eydnaðist mær - uttan nakra avtalu áðrenn - at koma í sjónvarp, útvarp og bæði stóri bløðunum. Tað duga vit, men hevði tað verið at fáa eitt samband við Lufthansa, so vildi tað ikki rigga, sigur Jesper Rungholm.

Ein og hvør, sum bert hevur fylgt eitt sindur við, kann kenna ein ávísan sannleika handan orðini hjá Jesper Rungholm. Orð frá Jesper Rungholm hava í stríðum streymi vitjað føroysk miðlar, og undirritaði kennir tað eitt sindur løgið at sita í Vamdrup.

Royndirnar higartil gera, at Jesper Rungholm trýr upp á, at Føroyar kunnu gerast ein ógvuliga spennandi marknaður.

- Tað er ein øgiliga spennandi marknaður í Føroyum, sum tykist at vera lítið útnyttaður. Tað er jomfrúirligur marknaður í Føroyum, sigur Jesper Rungholm.

Men DAT verður ikki sum hini. Tað eru ongar ætlanir um at gevast at flúgva við propellflogførum.

- Og keypa vit eitt størri, so verður tað í øllum førum ikki eitt sum British Aerospace flogførini hjá Atlantic Airways. Tað er ein farin tíð eftir okkara hugsan.

Vit fara heldur ikki at opna egið kontór ella líknandi. Vit skulu vera eitt alternativ, og vit eru alternativir, sigur Jesper Rungholm.

Fíggjarliga orkan er ikki til staðar at gera ein stóra íløgu í eitt jet flogfar, men tað er ikki ómøguligt - men vit eru øðrvísi.

Prísirnir hjá DAT skulu vera bíligari enn hjá Atlantic, sigur Jesper Rungholm. Men júst hvussu ein møguligur prísstrukturur fer at síggja í einari fastari rutuflúgving, veit Jesper ikki at siga okkum.

Tey framúr góðu tilboðini hava verið sokallaðar reverse flow flúgvingar, eitt nú til Danmarkar á jólum - og ikki øvugt.

## Eftirmeting

Í skrivandi stund er avgerðin ikki tikin um, hvørt DAT heldur fram við at flúgva til Føroya. Eitt er hvussu nógvir ferðaseðlar eru seldir, men tað verða eisini gjørdar kanningar millum kundarnir.

- Vísir tað seg, at kundarnir siga kortanei til at flúgva í tríggjar tímar, so er ikki so nógv hjá okkum at gera her, sigur Jesper Rungholm.

Føroya rutu flúgvingin er eitt gott dømi um, hvussu DAT virkar.

- Vit kunnu uttan at missa nakra æru siga, at vit ikki halda fram við at flúgva til Føroya. Vit sýna størsta varsemi, men vísir tað seg at fara at løna seg, so vildi vit eisini halda fram, sigur Jesper Rungholm.

## FAKTA

**Navn:** Jesper Rungholm
**Giftur:** Kirsten Rungholm
**Børn:** Albert 8, Andrea 11 og Robert 13
**Útbúgving:** Reklamefotograg og flogskipari.
**Um DAT:** Danish Air Transport varð stovnað í 1989 av Jesper og Kirsten Rungholm. Av fyrstan tíð virkaði fyritøkan við einum lítlum flogfari at flúgva; síðani er fyritøkan voksin støðugt, og í dag er 140 starvsfólk og selt verður fyri einari 250 milliónir(mett 2005) árliga. Flogið verður bæði vanliga rutuflúgving, frakt, charter og alt annað, sum kann geva nakrar pengar í kassan. DAT er virkin í fleiri londum. Millum annað ger DAT seg rættiliga galdandi í Noreg, har flogið verður til og úr Florø. DAT hevur áður flogið starvsfólk hjá Agip/Eni til og úr Føroyum í sambandi við royndarboringarnar.